## Barn doyði av sjónvarpi

Ein tvey ára gomul smágenta í skotska býnum Edinburg doyði, eftir at eitt sjónvarpstól var dottið oman yvir hana. Tilburðurin var leygardagin. Høvdið á gentuni kom at liggja undir sjónvarpstólinum, og hóast foreldrini fingu hana á sjúkrahús beinanvegin, kundu læknarnir ikki bjarga lívi hennara. Síðini vanlukkuna hava skotskir felagsskapir, ið fáast við trygd hjá børnum, mint foreldur á, hvussu týdningarmikið tað er hava eyga við teimum smáu. Felagsskapirnir siga í hesum viðfangi, at tung sjónvarpstól eiga at verða fest, soleiðis at tey ikki kunnu detta.



## Íslendsk skip millum sjórænarar

Íslendska fiskiskipið Skinney, sum er á veg úr Taiwan til Íslands, siglir í hesum døgum fram við somalisku strondini, har sjórænarar hava rænt fleiri skip teir seinastu mánaðirnar. Tí fær íslendska skipið verju frá herskipum, sum eru send á leiðirnar har at ansa eftir farma- og øðrum skipum, sum sigla har. Skinney, sum hoyrir heima á Hornafirði, er 30 metrar langt og útgjørt sum trolari og garnaskip. Skipið er smíðað í Taiwan, og fimm íslendingar eru nú á veg heim við skipinum.

# Høgaberg liðugur við svartkjaftin

**Stóra kombineraða nóta-og trolskipið hjá Framherja liggur í løtuni í Havn, har tað verður ansað av maskinmanni, nú skipið er liðugt við fyrsta partin av svartkjaftakvotuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Pelagiska vinnan í Føroyum kennir nú álvarsliga sviðan av, at føroyska tillutaða svartkjaftakvotan fyri 2009 er so lítil, at fyribilsbýtið hjá landsstýrismanninum av kvotuni bert røkkur til ein ella knappliga tveir túrar í part hjá teimum stóru skipunum.

Høgaberg, sum er annað av stóru pelagisku skipunum hjá Framherja, hevur í ár gjørt tveir svartkjaftatúrar og er soleiðis liðugur at fiska sína fyribilskvotu.

Anfinnur Olsen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin hjá skipinum var góður.

– Hesin parturin av árinum er besta tíðin til svartkjaft, men nú fiskurin gýtir, fer hann eisini at gerast rakari, sum tíðin líður, leggur hann aftrat.



*Høgaberg fyllur nógv við bryggjuna á vestaru vág í Havn. Skipið er 58,66 metrar langt og 13,60 metrar breitt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Verður ansaður

Reiðarin sigur, at avgerðin um at leggja skipið í Havn, nú bíðað verður eftir, at landsstýrismaðurin fer at býta útaftur av svartkjaftakvotuni, kemst av, at maskinmaðurin, sum ansar skipinum, meðan tað liggur, býr í Havn.

– Tú kanst ikki bara hava eitt skip liggjandi. Neyðugt er, at ljósmotorarnir ganga, og at hiti er umborð á skipinum. Hesum tekur ein maskinmaður í Havn sær av, sigur Anfinnur Olsen.

Reiðarin sigur seg einki vita at siga um, nær Høgaberg loysir aftur.




# Fiskar laksasild í altjóða sjógvi

**Fagraberg, sum Framherji eigur, er farin í altjóða sjógv av royna eftir laksasild**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kann vera kostnaðarmikið hjá stórum skipum at gera royndir, men tað kostar eisini at lata skipini liggja. Hóast oljan nú kostar munandi minni, enn hon gjørdi, tá hon var dýrast, er tað kostnaðarmikið hjá stórum skipum at sigla aftur og fram – um eingin veiða er.

### Í altjóða sjógv

Sum skilst, hevur eitt nú Finnur Fríði gjørt einar tveir ella tríggjar túrar eftir laksasild í ár, og nú er Fagraberg so eisini farin á hesa veiði.

Munur er, at meðan Finnur Fríði hevur roynt í føroyskum sjógvi, vildu føroysku fiskiveiðimyndugleikarnir helst, at Fagraberg fór í altjóða sjógv.



Anfinnur Olsen, reiðari á Fagrabergi, sigur, at skipið er farið á leiðirnar, sum liggja suður úr 200 fjórðinga fiskimarkinum hjá Íslandi.

Ilt er at meta um útlit fyri veiði eftir laksasild í altjóða sjógvi, og reiðarin sigur seg ikki vita ítøkiliga, hvussu nógv fiskurin verður keyptur fyri.

– Men nú fara vit so at gera hesa royndina, meðan bíðað verður eftir, at greiða fæst á komandi svartkjaftabýtinum, leggur Anfinnur Olsen aftrat.

### Alt í einum

Tað eru reiðarar sum halda, at landsins myndugleikar bara skuldu havt býtt alla svartkjaftakvotuna út í senn, so hesin fiskurin kundi verið fiskaður, meðan hann er bestur.

Men hetta hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, valt ikki at gera.

Samlaða svartkjaftakvotan í ár er stívliga 40.000 tons, men nakað liggur eftir, sum ikki varð fiskað í 2008.

Mett verður tí, at fiskast kunnu tilsamans 67.000 tons av svartkjafti í føroyskum sjógvi í ár.